

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 04 - 2012

# Statoilboring - Væleydnað venjing í Havn

Nú tað nærkast enn eini boring á føroyska landgrunninum varð nú um dagarnar skipað fyri eini sokallaðari Table-Top (skriviborðs) venjing í Havn, sum sambært heimasíðuni hjá MRCC Tórshavn gekk væl. Statoil, ExxonMobil og Atlantic Petroleum fara í summar at seta á 8. brunnin á Brugdan 2 leitimiðinum 90 fjórðingar í ein landssynning úr Føroyum. Við í venjingini vórðu umboð fyri ymsar stovnar og feløg, sum eru ein náttúrligur partur av tilbúgvingarskipanini her á landi. Millum luttakararnar varð eisini MRCC Tórshavn, sum skrivar á heimasíðu síni, at venjingin tók støði í eini hending, har tað var eldur umborð á boripallinum COSL Pioneer við 110 fólkum umborð. Venjingin, sum gekk væl og var lærurík, verður nú eftirmett. MRCC Tórshavn hevði uppgávuna at samskipa venjingina í tøttum samstarvi við Statoil, RCC/Aberdeen, løgregluna og aðrar relevantar myndugleikar.